# Kunngerð

Vísandi til at fólkatingsval er útskrivað, fer hetta fram
**Týsdagin tann 8. februar 2005.**

Valið fer fram á kommunuskrivstovuni, frá kl. 9.00 til kl. 20.00

**Brævatkvøða:**
Veljarar, sum verða burturstaddir valdagin ella á annan hátt lúka treytirnar fyri at greiða brævatkvøðu, kunnu í seinasta lagi leygardagin 5. februar 2005 greiða brævatkvøðu, við at venda sær til kommunuskrivstovuna.

Brævatkvøður skulu vera valnevndini í hendi innan valið byrjar, kl. 9.00, týsdagin 8. februar 2005.

**Valkort:**
Valkort verða send veljarunum.

Mint verður á, at tygum eiga at hava valkortið við á val.

**Sandavágs kommuna**
**FO-360 Sandavágur**
**Tlf. 332470**

# Frá Leirvíkar Arbeiðsmannafelag

Ársaðalfundur Leirvíkar Arbeiðsmannafelags verður 1. mars 2005.

Tíð og stað verður kunngjørt seinni.

Dagsskrá sambært lógum felagsins.

Uppskot til ársaðalfundin skal vera nevndarformanninum í hendi í seinasta lagi 21. februar 2005.

**Nevndin**

**Landssjúkrahúsið**
FO 100 Tórshavn

# Læknaskrivarar

Á **Medisinska deplinum** eru 2 føst fulltíðarstørv sum læknaskrivari leys at søkja til setan 1. mars 2005 ella eftir avtalu.

**Førleikakrøv:**
- útbúgving sum læknaskrivari
- dugir at raðfesta arbeiðið, sum til tíðir er krevjandi
- góð samstarvsevni
- góður røkjuskapur
- teldukunnleiki

**Løn og setanartreytir** sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálaráðið.

**Nærri upplýsingar** um starvið við at ringja til Sæunn Ólavsdóttir Hansen, leiðsluskrivara, telefon 304500, lokal 6103.

**Umsóknarfreistin** er 16. februar 2005 kl. 12.00.

Skrivligar umsóknir í brævbjálva merktur "umsókn til starv" við CV, avriti av prógvum og viðmælum skulu sendast til:

**Landssjúkrahúsið**
Lønar- og Starvsfólkadeildin
FO 100 Tórshavn

*Á heimasíðuni hjá Landssjúkrahúsinum www.lsh.fo sæst meira um størv við at klikka á leinkjuna "starvsfólk"*

Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
i



www. Sosialurin .fo

# Størv á Føroya Læraraskúla frá 1. august 2005

Hevur tú hug at royna teg í einum mennandi námsfrøðiligum starvi í støðugari broyting, hava vit eina spennandi avbjóðing til tín á Føroya Læraraskúla skúlaárið 2005/06

Føroya Læraraskúli hevur til uppgávu at útbúgva lærarar og pedagogar. Útbúgvingin er skipað við fastari tímatalvu, sum við jøvnum millumbilum verður niðurløgd til frama fyri evnis- og verkætlanararbeiði.

Størvini eru tímalærarastørv. Tímarnir, sum leysir eru at søkja, eru í hesum lærugreinum:

**Støddfrøði:** grundlærugreinin í 1. flokki á læraraútbúgvingini. 5 undirvísingartímar um vikuna.
**Drama:** á pedagogútbúgvingini, umleið 5 undirvísingartímar um vikuna, og á læraraútbúgvingini, 2 undirvísingartímar um vikuna. Herumframt 2 tímar um vikuna til alment drama.
**Danskt:** Grundlærugreinin danskt í 1. flokki á læraraútbúgvingini. 4 undirvísingartímar um vikuna.
**Samtíðarkunning:** Í 1. flokki á læraraútbúgvingini. 3 undirvísingartímar um vikuna.
**Samfelagsfrøði:** á pedagogútbúgvingini 2,75 undirvísingartímar um vikuna.
**Sangi:** Umleið 5 tímar um vikuna

Tey, ið sett verða í størvini, skulu hava útbúgving frá hægri góðkendum lærustovni, ella á annan hátt prógva neyðugan førleika.
Viðkomandi skulu vera fús at samskipa útbúgvingarvirksemið í teirra lærugrein/um við aðrar lærugreinar, m.a. í sambandi við evnisarbeiði og verkevni, og hava skyldu at luttaka í arbeiðsbólkum, útbúgvingunum at frama, og sum heild í øllum tiltøkum, sum sett verða í verk at menna útbúgvingarnar.

Eisini kunnu tey, ið sett verða, fáa møguleika at undirvísa á teimum eftirútbúgvingum, sum Læraraskúlin setur í verk.

Tímalærarastørvini verða sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Magistarafelag Føroya, annars sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Umsóknir skulu stílast til Føroya Læraraskúla og sendast til

**Føroya Læraraskúla,**
Postsmogu 348,
FO-110 Tórshavn
Áskrift: Umsókn

Umsóknirnar skulu vera skúlanum i hendi innan 15. februar 2005 á middegi.

Tey, sum ynskja fleiri upplýsingar um størvini, eru væl komin at seta seg í samband við rektaran, ið er at hitta á tlf.313501 ella á tlf. 225328 ella á telduposti paulini@flsk.fo

**Føroya Læraraskúli**
**12. januar 2005**